Løgmansskrivstovan

Dagfesting:	29.februar.2024
Mál nr.:	23/02957
Málsviðgjørt:	SR
Ummælistíð:	3.-20.oktober 2023
Eftirkannað:	11. jan. 24

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Ræðislógin)
(Yvirtøka av málsøkinum sjórættur)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 41 frá 10. mai 2006 um ræði á málum og málsøkjum (Ræðislógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 60 frá 22. mai 2023, verður § 1, stk. 2, nr. 18 strikað.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 29. juli 2025.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Landsstýrið hevur gjørt av at yvirtaka málsøkið sjórættur.

Yvirtøkan er sett út í kortið í samgonguskjalinum í desember 2022, tá ið semja var gjørd um at yvirtaka málsøkið.

Føroyar eru sjófarandi tjóð, og umráðandi er, at ræðið á so týðandi málsøki er á føroyskum hondum. Málsøkið hevur harafturat tætt tilknýti til onnur øki, sum eru yvirtikin, heruppií trygd á sjónum, loðsøki, vitaverk og sjóuppmerking.

Við yvirtøku av sjórættinum eru lóggávuvaldið, útinnandi valdið og fíggjarliga ábyrgdin á øllum sjóvinnuøkinum yvirtikin sum føroyskt sermál.

1.2. Galdandi lóggáva
Galdandi lóggáva á økinum er:

- Anordning nr. 187 frá 8. februar 2017 om ikrafttræden for Færøerne af søloven, sum broytt við anordning nr. 1122 frá 29. juni 2022.
- Bekendtgørelse nr. 3 frá 18. februar 2005 um International fond for erstatning af skader ved olieforurening.
- Bekendtgørelse nr. 35 frá 15. januar 2014 um danske oliemodtageres oplysnings- og bidragspligt til den internationale fond for erstatning af skader ved olieforurening, 1992 (1992-fondskonventionen) og protokollen af 2003 til 1992-fondskonventionen (den supplerende fond), sum broytt við bekendtgørelse nr. 882 frá 18. juni 2018.
- Bekendtgørelse nr. 196 frá 27. februar 2017 for Færøerne om certifikater til bekræftelse af forsikring eller anden garanti til dækning af det civilretlige ansvar for forureningsskader forårsaget af bunkersolie fra skibe.
- Bekendtgørelse nr. 197 frá 27. februar 2017 for Færøerne om forsikringscertifikater som bevis for dækning af søretlige krav.
- Bekendtgørelse nr. 198 frá 27. februar 2017 for Færøerne om en særlig ansvarsgrænse for skibe under 300 tons forandre krav, der følger af personskader eller dødsfald.
- Bekendtgørelse nr. 199 frá 27. februar 2017 for Færøerne af York-Antwerpen reglerne af 1990.

Eldri lóggáva, sum enn formelt er galdandi í Føroyum:

- Lov nr. 49 af 24. mars 1899: Strandingslov for Færøerne.
- Lov nr. 75 frá 29. mars 1904 um Rederes Forpligtelse til at meddele statistiske Oplysninger, sum broytt við lov nr. 127 frá 15. apríl 1930.
- Lov nr. 198 frá 16. maj 1950 um fremmede statsskibe m.v.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er formliga at yvirtaka málsøkið sjórættur sum føroyskt sermál. Við uppskotinum yvirtaka føroyskir myndugleikar lóggávuvaldið, útinnandi valdið og fíggjarligu ábyrgdina á málsøkinum.

Lógarkarmarnir, ið regulera sjórættin í einstøku londunum, eru í stóran mun gjørdir við støði í altjóða sáttmálum, reglum og tilmælum.

Týdningarmesta lóggáva á økinum, sum skal yvirtakast, er sjólógin. Sjólógin fyri Føroyar er grundað á donsku sjólógina frá 1994 við seinni broytingum, sum m.a. byggir á eitt norðurlendskt samstarv og líkist tí sjórættarlóggávuni í øðrum Norðurlondum.

Sjólógin inniheldur reglur um fíggjarrættin á sjónum. Sjólógin regulerar sostatt í høvuðsheitum viðurskifti millum privatar partar í samband við sigling og hevur m.a. reglur um:

- sjópant í skipum
- partsreiðarí, heruppí um leiðslu og ábyrgd
- skyldur skipsførarans mótvegis m.a. reiðaríi, heruppií reglur um at tryggja, at skip eru sjófør
- trygging ímóti sjórættarligum krøvum
- endurgjald og ábyrgd í samband við samanstoyt
- ábyrgd í samband við oljudálkingarskaðar
- flutning av stykkjagóðsi, heruppií um ábyrgd og endurgjald
- flutning av ferðafólki og ferðagóðsi
- bjarging av skipum og sjóskaðar (havarí)
- sjóforhoyr

Umframt at regulera viðurskifti millum privatar partar á sjóøkinum, inniheldur sjólógin eisini myndugleikauppgávur, heruppií at skriva út loyvisbrøv og at hava eftirlit við, at lógin verður hildin.

Tað verður mett at hava stóran týdning, at lóggávan á sjórættarøkinum er í samsvari við lóggávuna í grannalondunum, londunum, sum samstarvað verður við, og teir altjóða sáttmálar, sum onnur framkomin lond hava valt at implementera.

Føroyar hava atlimaskap í altjóða felagsskapinum International Maritime Organisation (hereftir IMO), ið er felagsskapur undir Sameindu Tjóðum, og sum stendur fyri flestu altjóða sáttmálunum á økinum. Limir og atlimir í IMO verða regluliga skoðaðir av IMO. Til skoðanirnar verður øll lóggáva og fyrisiting av lóggávuni gjøgnumgingin. Fyri at fáa góð skoðsmál frá IMO skal eingin ivi verða um, at kravda lóggávan er sett í gildi og, at limalandið fyrisitur lóggávuna rætt. Tað er avgerandi fyri, at Føroyar kunnu varðveita og framhaldandi fáa góð skoðsmál sum sjóvinnutjóð, at yvirtøkan verður skipað á skilagóðan hátt, og at umsitingin aftaná yvirtøkuna hevur neyðuga innlitið og orkuna til at tryggja, at nýggir sáttmálar og broytingar í sáttmálum verða implementeraðir í føroyska lóggávu.

Sambært § 5 í yvirtøkulógini, sum er løgtingslóg nr. 79 frá 12. mai 2005, og sambært § 13 í heimastýrislógini, sum er lov nr. 11 frá 31. mars 1948, verður galdandi lóggáva á yvirtikna økinum verandi í gildi til broytingar verða gjørdar.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við uppskotinum verður málsøkið sjórættur yvirtikið sum føroyskt sermál ólavsøkudag 2025.

Lagt verður upp til, at lóggávan á sjórættarøkinum eftir yvirtøkuna eins og í dag skal fylgja altjóða sáttmálum v.m., og tí er ikki lagt upp til at broyta lóggávuna grundleggjandi í sambandi við yvirtøkuna.

Fyri at tryggja, at føroyska sjóvinnan ikki verður negativt merkt av yvirtøkuni, verður tí lagt upp til, at málsøkið verður yvirtikið ólavsøkudag 2025. Hetta hevur við sær, at føroyskir myndugleikar fáa stundir at fyrireika yvirtøkuna samstundis sum, at dentur verður lagdur á, at Føroyar varðveita neyðugar altjóða góðkenningar, føroysku vinnuni til fyrimunar.

Í tíðarskeiðinum frá viðtøku Løgtingsins av uppskotinum um yvirtøku til gildiskomu ólavsøkudag 2025 fer Uttanríkis- og vinnumálaráðið saman við viðkomandi donskum og føroyskum myndugleikum og viðkomandi privatum pørtum sostatt at lýsa málsøkið meira nágreiniligt. Umráðandi er, at støða verður tikin til og heilt vís greiða verður fingin á, hvørjar uppgávur føroyskir myndugleikar yvirtaka, hvørjir føroyskir myndugleikar skulu varða av uppgávunum, og hvørjar avleiðingar tað hevur fyri privatar partar.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Umhvørvismálaráðnum, Løgmálaráðnum, Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum, Sjóvinnustýrinum, Umhvørvisstovuni, Arktisk Kommando, Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Kommunufelagnum, Landsverki, MRCC, Ríkisumboðnum, Vinnuháskúlanum, Vinnustovninum, Vinnuhúsinum, VØRN, Reiðarafelagnum fyri Handilsskip, Føroya Reiðarafelag, Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Maskinmeistarafelagnum og Føroya Fiskimannafelag.

Løgmansskrivstovan hevur viðgjørt innkomnu hoyringarsvarini í viðlagda uppriti, sí fylgiskjal 3.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Mett verður, at samlaði kostnaðurin av yvirtøkuni í 2025 verður 1,8 mió kr. (tvey ársverk). Uttanríkis- og vinnumálaráðið fer saman við donskum myndugleikum at nágreina fíggjarligu avleiðingarnar.

Í fylgiskjali 2 til uppskotið hevur Søfartsstyrelsen mett um fíggjarligu og umsitingarligu orku stovnsins at umsita hetta økið í dag. Av tí, at arbeiðið í Søfartsstyrelsen, sum hevur við sjórætt og Føroyar at gera, er ein integreraður partur av arbeiðinum við sjórætti fyri ríkið sum heild, ber ikki til hjá Søfartsstyrelsen neyvt at gera upp, hvørjar útreiðslur stovnsins eru av at umsita hetta økið viðvíkjandi Føroyum. Arbeiðið viðvíkjandi sjórættinum fevnir um hesar uppgávur:

- lógarfyrireikandi arbeiði,
- luttøku í altjóða samstarvi
- og aðrar uppgávur, sum heilt ella partvíst eru inntøkufíggjaðar.

Til ber ikki at siga neyvt, hvørjar útreiðslurnar verða av at fyrireika lóggávu á økinum, men talan er um eitt stórt og torgreitt øki, sum krevur løgfrøðiliga serfrøði. Til tann partin, sum snýr seg um luttøku á fundum í altjóða samstarvi verður mett, at 1/12 ársverk skal nýtast.

Einans fyri tær uppgávurnar, sum eru inntøkufíggjaðar, ber til at gera eina neyva kostnaðarmeting, sí talvu á s. 3 í fylgiskjali 2. Mett verður, at tvey ársverk eiga at verða sett av til hesar uppgávurnar.

Landsstýrið fer í eykajáttan í 2024 og í fíggjarlógini fyri 2025 at skjóta upp at seta pening av til arbeiðið við yvirtøku av sjórættinum. Mett verður sostatt, at peningur eigur at verða settur av, soleiðis at neyðug orka kann verða nýtt til at lýsa økið á nøktandi hátt, dagføra lóggávuna, og sum heild at fyrireika yvirtøkuna. Lagt verður upp til, at játtanin hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum á fíggjarlógini fyri 2024 verður økt við 1 ársverki, og at játtanin hjá Sjóvinnustýrinum á fíggjarlógini fyri 2025 verður økt við 1 ársverki.

Víst verður til pkt. 2.2, har umsitingarligu avleiðingarnar eru nærri lýstar.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Mett verður, at yvirtøkan av málsøkinum sjórættur hevur umsitingarligar avleiðingar fyri landið.

Danska sjólógin verður dagførd nærum árliga, m.a. tí at lógin er implementering av altjóða sáttmálum, ið verða broyttir regluliga, og sum staturin hevur skyldu at implementera í nationala lóggávu so hvørt. Sjólógin galdandi í Føroyum er dagførd í mun til donsku lógina fram til 2012. Miðað verður ímóti, at sjólógin, sum er galdandi í Føroyum, verður dagførd í sambandi við yvirtøkuna, so lógarverkið er dagført í mun til galdandi altjóða krøv á ólavsøku 2025.

Sjórættur, heruppií sjólógin, er eitt stórt og komplekst øki. Í Danmark hevur man síðani 1977 havt eitt Sølovsudvalg, samanset m.a. av løgfrøðiligum serfrøðingum, sum hava serligt innlit í sjórætt, og sum viðger ymisk mál á sjórættarøkinum m.a. ger uppskot til broytingar í sjólógini. Søfartsstyrelsen er skrivstova hjá Sølovsudvalget og fyrireikar mál at leggja fyri nevndina. Mett verður, at dagføringin og áhaldandi at fylgja við í altjóða gongdini á økinum krevur eitt ársverk.

Danska Søfartsstyrelsen umsitur í dag sjórættarøkið í Føroyum. Hetta hevur við sær m.a. luttøku í altjóða fora á økinum, heruppií IMO. Føroyskir myndugleikar skulu eftir yvirtøkuna umboða Føroyar í altjóða samstarvi á øllum økjum innan maritima lóggávu. Føroyar hava atlimaskap í IMO og luttaka tí í ávísan mun longu í arbeiðinum í IMO. Yvirtøkan hevur við sær, at Føroyar skulu luttaka á fleiri fundum. Av tí, at vit í Føroyum hava eina altjóða skipaskrá, FAS, er serliga neyðugt at taka lut í IMO fundum, har neyvt verður fylgt við í, hvørjar broytingar altjóða krøvini hava við sær, soleiðis at Føroyar framhaldandi kunnu hava eina altjóða skipaskrá.

Søfartsstyrelsen skrivar harafturat árliga eftir umsókn út 4 ymisk loyvisbrøv til skip í FAS. Føroyskir myndugleikar skulu eftir yvirtøkuna skriva út loyvisbrøvini, sum Søfartsstyrelsen í dag skrivar út. Sambært uppgerð hjá Søfartsstyrelsen hevur stovnurin givið út í miðal 178 loyvisbrøv um árið í tíðarskeiðinum 2018-2022 til føroysk skip.

Mett verður, at hetta arbeiðið, t.e. luttøka í altjóða samstarvi og málsviðgerð – tá málsøkið er yvirtikið, og neyðugur kunnleiki fingin til vegar – krevur eitt ársverk.

Eftir ætlan verður umsitingin av økinum løgd Sjóvinnustýrinum, sum í dag umsitur aðrar partar av sjóvinnuøkinum, undir hesum trygd á sjónum, og mett verður, at hetta krevur eitt ársverk.

Fyri avvarðandi aðalráð verður neyðugt at seta starvsfólkaorku av, heruppií til saman við Sjóvinnustýrinum at arbeiða við yvirtøkuni, at uppbyggja neyðugan kunnleika til økið, og at arbeiða við lógarfyrireikandi arbeiði frameftir. Mett verður, at eitt ársverk má setast av í avvarðandi aðalráði.

Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógarkarmarnir, ið regulera sjórættin, eru í stóran mun gjørdir við støði í altjóða sáttmálum, reglum og tilmælum, og verður tað mett at hava stóran týdning, at lóggávan í Føroyum á hesum øki er í samsvari við lóggávuna í grannalondunum, londunum, sum samstarvað verður við, og teir altjóða sáttmálar, sum onnur framkomin lond hava valt at seta í gildi.

Føroyar hava atlimaskap í IMO, sum stendur fyri flestu altjóða sáttmálunum á økinum. Eitt krav til øll limalond er, at allir avvarðandi myndugleikar í landinum skulu skoðast av einum altjóða toymi frá IMO. Um skoðanartoymið kemur til ta niðurstøðu, at skyldurnar ikki verða lyftar til fulnar, er vandi fyri, at Føroyar fáa ring skoðsmál frá IMO. Um Føroyar ikki megna at varðveita góðu skoðsmálini, eins og tey seinnu árini, verður m.a. ikki longur møguligt at hava eina føroyska altjóða skipaskrá, sum er kappingarfør.

Harumframt søkja Føroyar í løtuni um limaskap í Paris MoU. Paris MoU er ein altjóða felagsskapur, ið hevur til endamáls at føra eftirlit við, at skip, ið koma í havn, liva upp til øll altjóða krøv. Talan er um standard krøv, ið eru galdandi fyri øll lond, ið eru limir í Paris MoU. Av tí, at øll londini fremja sama eftirlit eftir somu treytum, skulu øll skip, ið koma í havn í landi, ið er limur í Paris MoU, liva upp til somu altjóða krøv. Krøv verða tí sett limalondum um, at lóggávan á økinum er dagførd, og at londini hava implementerað alla kravda altjóða lóggávu. Eru ivamál um, hvørt Føroyar liva upp til krøvini í Paris MoU, kann umsóknin um limaskap í Paris MoU verða noktað.

Á sjórættarøkinum er umframt altjóða samstarvið eisini norðurlendskt samstarv, sum hevur við sær, at lóggávan í Norðurlondum á hesum økinum líkist. Í sambandi við yvirtøkuna skal kannast í hvønn mun tað er viðkomandi fyri Føroyar at luttaka í slíkum samstarvi, og hvussu føroyska luttøkan kann skipast.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

1) **Hoyvíkssáttmálin**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar í mun til nevnda sáttmála.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar í mun til nevnda sáttmála.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar í mun til nevnda sáttmála.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Ja, við yvirtøkuni fær landsstýrismaðurin heimildirnar, sum higartil hava ligið hjá donskum ráðharra.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Við hesi grein verður yvirtøkan formliga framd.

Til § 2
Yvirtøkan er sett at verða ólavsøkudag 2025.

Fyri at tryggja, at føroyska umsitingin er klár at taka við uppgávunum, sum í dag liggja hjá donskum myndugleikum, og at føroyska sjóvinnan ikki verður merkt av yvirtøkuni, verður lagt upp til, at málsøkið verður yvirtikið ólavsøkudag 2025. Hetta hevur við sær, at føroyskir myndugleikar fáa stundir at fyrireika yvirtøkuna, samstundis sum dentur verður lagdur á, at Føroyar varðveita neyðugar altjóða góðkenningar, føroysku vinnuni til fyrimunar.

Í tíðarskeiðinum frá viðtøku av uppskotinum um yvirtøku til gildiskomu ólavsøkudag 2025, fer Uttanríkis- og vinnumálaráðið saman við viðkomandi donskum og føroyskum myndugleikum og privatum pørtum sostatt at lýsa málsøkið meira nágreiniligt. Umráðandi er, at støða verður tikin til, og heilt vís greiða verður fingin á, hvørjar uppgávur føroyskir myndugleikar yvirtaka, og hvørjir føroyskir myndugleikar skulu varða av uppgávunum. Miðað verður harafturat ímóti, at sjólógin, sum er galdandi í Føroyum, verður dagførd í samband við yvirtøkuna, so lógarverkið er dagført í mun til galdandi altjóða krøv á ólavsøku 2025.

Løgmansskrivstovan, 29. februar 2023

Aksel V. Johannesen
løgmaður

/ John Rajani

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Søfartsstyrelsen notat af 17. marts 2023 om det anslåede ressourceforbrug til sølovsområdet
Fylgiskjal 3: Upprit um innkomnar viðmerkingar
Fylgiskjal 4: Ummæli frá Umhvørvismálaráðnum
Fylgiskjal 5: Ummæli frá Fjarskiftiseftirlitinum
Fylgiskjal 6: Ummæli frá Vørn
Fylgiskjal 7: Ummæli frá Heilsufrøðiliga Starvsstovuni
Fylgiskjal 8: Ummæli frá Sjóvinnustýrinum
Fylgiskjal 9: Ummæli frá Føroya Reiðarafelag
Fylgiskjal 10: Ummæli frá Maskinmeistarafelagnum
Fylgiskjal 11: Ummæli frá Føroya Fiskimannafelag
Fylgiskjal 12: Ummæli frá Søfartsstyrelsen